# Skipasmiðjan í Vági minni at gera

**Skipasmiðjan í Vági hevur sagt fólki upp, men stjórin roknar við, at tað verður meira at gera ímóti summri, og tá koma fólkini til arbeiðis aftur**

SKIPASMIÐJA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið Vágs Skipasmiðja í síni tíð hevði flest fólk til arbeiðis, vóru tey verða 32, men so umfatandi hevur virksemið ikki verið seinnu tíðina, og í løtuni er ein lítil helvt av hesum til arbeiðis á skipasmiðjuni.

– Hetta er tann ringasta árstíðin hjá skipasmiðjunum, og tað er einki óvanligt í, at vit hava minni at gera fyrst í árinum, sigur Gudmund Jacobsen, stjóri.

Seinastu tíðina hava millum 18 og 20 fólk verið til arbeiðis á skipasmiðjuni, men nøkur fólk eru uppsøgd, tí tað er ov lítið at gera.

– Hesi fólk eru sett í bíðistøðu, og tá ið vit fáa meira at gera aftur, rokna vit við, at tey koma øll í arbeiði aftur, sigur Gudmund Jacobsen.

– Í juni, juli og august mánaði plaga vit at hava úr at gera, og vit vóna, at tað verður soleiðis aftur í ár, sigur hann.

Í løtuni er nýggi Nesborg til eftirlit á Vágs Skipasmiðju.

# Jenny verður stjóri




*Jenny C. Pedersen hevur drúgvar royndir innan leiklist. Nú skal hon standa á odda fyri menningini av Tjóðpalli Føroya*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tað verður Jenny C. Pedersen, sum verður fyrsti stjórinfyri Tjóðpall Føroya**

STJÓRASETAN
*tíðindaskriv*

Leiklistaráðið avgjørdi á fundi í gjár, 17. januar, at seta Jenny C. Petersen í starv sum fyrsta stjóra fyri Tjóðpall Føroya. Hon tekur formliga við starvinum 1. februar 2005.

Jenny C. Petersen hevur drúgvar royndir á leiklistarliga økinum. Hon byrjaði sína yrkisleið í Sjónleikarahúsinum í Havn seinast í 70'árunum sum áhugaleikari. Í 1982 fór hon í skrivstovulæru hjá p/f Ludvig Breckman og seinni hjá grannskoðaravirkinum C. V. Weihe. Frá 1985 var hon styttri skeið í Norra og Danmark og arbeiddi við leiklist. Í 1987 fekk hon boðið starv í Norra og hevur síðani tá arbeitt við leiklist burturav, 14 ár í einum norskum yrkisleiklistahúsi, Sogn og Fjordane Teater, og síðani 2000 í Leikhúsinum Grímu og Leikpalli Føroya.

Í Sogn og Fjordane Teater arbeiddi Jenny á øllum økjum innan sjónleikarframleiðslu, serliga sum inspientur, har hon hevði listarligu ábyrgdina eftir frumframførsluna. Hon var fastur turnéleiðari og hevði ábyrgd av teaturbátinum hjá leikhúsinum á turnéunum. Frá 1992 var hon framleiðsluleiðari. Hon hevur eisini havt ábyrgd av at leggja leikskrá og fíggjarætlanir, arbeiðsætlanir og turnéætlanir. Meðan Jenny var í Norra, var hon við til at umskipa bygnaðin fyri Sogn og Fjordane Teater.

Jenny hevur eisini drúgvar royndir við leiklist í Føroyum. Hon arbeiddi við Havnarmyndum í 1980unum, var styttri tíðarskeið í Føroyum í 1993 og 1995, og hevur síðani 2000 arbeitt hjá Leikpalli Føroya og Leikhúsinum Grímu sum fyrisitingarligur leiðari saman við Eyðuni Johannessen.

# – Nú skulu tey seriøsu argumentini á fólkating

**Nýggi tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, John Johannesen stillar upp til fólkatingsvalið. Og hann er sannførdur um, at flokkurin fær annað umboðið. - Nú skal vera liðugt við kegli á fólkatingi, sigur hann**

JAVNAÐARVAL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

– Nú hava polarnir í føroyskum politikki sitið nóg leingi á fólkatingi. Nú er neyðugt at ein nýggj rødd verður at hoyra - okkara Javnaðarrødd!

John Johannesen hevur sum so mong onnur havt ein varhuga av at fólkatingsval var í væntu. Og tað kom tí ikki óvart á hann, at valið nú er útskrivað.



*- Tað er nóg nógv garterað og provokerað á fólkatingi. Nú skulu tey seriøsu argumentini fram, sigur John Johannesen, sum stillar upp til fólkatingsvalið*

– Eg havi gjørt mær mínar hugsanir um arbeiðið á fólkatingi. Og verði eg valdur, so ætli eg mær eisini at fara í eitt fornuftigt samarbeiði til frama fyri okkara land, sigur hann.

John varð ikki óvæntað valdur inn á ting við løgtingsvalið fyri einum ári síðani. Og nú stendur so næsta politiska avbjóðingin hjá honum á skránni.

### Kegl og provo

Sambært John hava tey seinastu árini verið merkt av nógvum óneyðugum kegli, tá talan er um føroyskt fólkatingsarbeiði.

– Arbeiðið verið merkt rættiliga nógv av provokatiónum og gartering frá føroyskari síðu. Slíkt er ikki til gagns fyri nakran.

– Nei, nú er tíðin komin til at tey seriøsu argumentini verða hoyrd. Og tey eiga vit í Javnaðarflokkinum, sigur hann.

Flokkurin hevur, eftir hansara meting, góðar møguleikar at fáa umboð í Fólkatingið hesaferð, tí flokkurin hevur løgmann og situr í landsstýrinum og hevur gjørt eitt gott arbeiði har.

### Tvær orsøkir

Tað eydnaðist at fáa orðið á John undir Oljuráðstevnuni í gjár. Og í stutta viðtalinum segði hann, at tað eru tvey ting, ið hava medvirkað til at hann nú fer at lata seg stilla upp - tey yvirskipaðu politisku og tey flokspolitisku.

Tá talan er um tey yvirskipaðu viðurskiftini, so hava verið - og eru - nógv mál, ið hava havt tað trupult í samskiftinum millum føroyingar og danir.

Og tað hevur so als ikki verið til fyrimuns fyri viðgerðirnar, at tað hava verið umboð fyri teir báðar politisku polarnar í tjóðskaparspurninginum, sum hava havt umboðan á fólkatingi í seinastuni.

– Hetta hevur ikki verið til frama fyri nakað sum helst. Eg trúgvi hinvegin, at tað er við ikki at provokera at tú kanst fáa nakað burtur úr í skilagóðum samráðingum, sigur John.

Tá talan er um viðurskiftini innanflokka í javnaðarflokkinum, so ynskir John at tær yngru kreftirnar í flokkinum fáa møguleikar at koma fram at markera seg.

– Tað er neyðugt at okkara yngru og góðu kreftir verða settar í posisjón, soleiðis at flokkinum eisini verður lív lagað í framtíðini, sigur hann.